**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Túrur nr. 1218 Sild og svartkjaftur norðanfyri, tíðarskeið 3-15/5 2012**

**Fólk frá HAV:** Leon Smith, Høgni Debes, Poul Vestergaard og Eydna í Homrum

**Ábyrgd:** Jan Arge Jacobsen

**Endamál:** At kanna nøgdirnar av sild, svartkjafti og makreli í økinum norðan fyri Føroyar (Norskahavinum). Ekkókanningin er partur av felagskanningunum av sild og svartkjafti, skipaðar undir "ICES Working Group of International Pelagic Surveys" (WGIPS, fyrrverandi WGNAPES), saman við skipum úr Noregi, Íslandi og ES.

**Reiðskapur:** Flótitrol við svartkjaftabelli/posa. Boyur og fendarar til at tóva í vatnskorpuni. CTD og WP2. Krilltrolið var eisini við, men var kortini ikki brúkt vegna tíðarneyð.

**Um túrin:** Túrurin byrjaði mikudagin 2. mai inni á Skálafjørðinum, har 38 og 200 kHz ekkóloddini vóru kalibrerað. Farið var av Havnini hóskvøldið 3. mai á midnátt. Farið var eystureftir út á 62º20'N og 4º43'V at gera eitt tóv í vatnskorpuni. Síðani var siglt vesturum, á 62º35'N 7º56'V har enn eitt tóv varð gjørt í vatnskorpuni. Hesi tóv vóru gjørd fyri at vita, um makrelur var komin á okkara leiðir. Tástani var farið á føstu kósirnar, vístar á (**Mynd 1**). Í byrjanini viðraði illa, hvassur vindur norðaneftir. So líðandi minkaði vindurin, og varð veðrið heilt gott, tá komið varð norður á tær norðastu kósirnar. Í móti endanum á túrinum skifti ættin í ein landsynning, fyri síðan aftur at koma høgt við illveðri. Ætlanin var at taka standardskurð N á vegnum heim, men tað varð ikki møguligt fyri veður.

Ætlaðu kósirnar hjá øllum luttakandi skipunum eru vístar í **Mynd 2**.

Norðhavssild
Áleið sama nøgd av sild var at síggja norðan fyri Føroyar í ár sum undanfarnu árini. Sildin stóð víða um og var at finna sum ein lind á 10-50 m dýpi, sum um dagin tók seg saman í smáar torvur á 250-300 m dýpi. Í norðara parti av kannaða økinum sást sildin um dagin taka seg saman í torvur á 250-400 m dýpi (**Mynd 3a**). Hesar torvur komu vanliga upp undir vatnskorpuna um náttina. Sildin stóð tættast í útnyrðingspartinum av økinum (**Mynd 3b**).

Ein fyribilsmeting av nøgdini av sild í kannaða økinum gevur umleið 1.2 mió. tons, sum er á leið tað sama sum í fjør og fyrrárið (1.3 og 1.5 milliónir tons). Her skal havast í huga, at kanningarøkið er ikki nágreiniliga tað sama sum í fjør, og at kósirnar ikki eru tær somu. Ein endalig útrokning av samlaðu nøgdini av norðhavssild verður gjørd, tá tølini frá øllum skipunum eru við. Hesar verða gjørdar í Reykjavík síðst í juni.

Longdarbýti av norðhavssild er víst í **Mynd 4**, miðallongdin er 33,7 cm og miðalvektin er 275 g, sum er nakað tað sama sum í fjør (33,4 cm og 271 g). T.v.s. at sildin er hampiliga væl fyri eftir árstíðini (t.e. eftir gýtingina). Tann størra sildin var at finna í vestara og útnyrðingspartinum av kannaða økinum, eins og hini árini. Aftur í ár var stór sild eisini at finna beint norðan fyri Føroyar. (**Mynd 8**).

Svartkjaftur
Meira var at síggja av svartkjafti í ár í enn í fjør. Hetta samsvarar við fyribils kanningarúrslitini vestan fyri bretsku oyggjarnar í vár í WGNAPES høpi. Svartkjaftur var

skrásettur í kantinum norðanfyri og út á Íslandsryggin. Úti á opnum havi sást eingin svartkjaftur (**Mynd 5**). Seks tey seinastu árini hevur sera lítið verið at sæð úti á. Longdarbýti av svartkjafti er víst í **Mynd 6**, miðallongdin er 31 cm og miðalvektin er 179 g í mun til 30.1 cm og 149 g í 2011. Ein nýggjur árgangur var at síggja, hetta er 3 ára gamal fiskur ella 2009 árgangurin. Vit sóu eisini henda árgangin í fjør.

Makrelur
Eingin makrelur var at síggja norðanfyri á túrinum, uttan í einum lítlum øki eystur móti markinum á 63º34'N og 1º12'V (**Mynd 7**). Gongdin seinastu árini hevur annars verið, at makrelurin er komin longri og longri vestur og norður í kanningarøkinum á hesum túrinum. Í ár er makrelurin so at siga ikki at síggja í kanningarøkinum, meðan í fjør var hann komin norður á 64º30N.

Hydrografi
Hitin í vatnskorpuni er vístur í **Mynd 8**, saman við miðallongdini av sild. Tann størra sildin er í kaldara sjónum, tað er í vestara og norðara partinum av kannaða økinum. Tó hevur stór sild eisini verið at sæð beint norðan fyri Føroyar á 63º27'N.

**Prøvatøka:** Á túrinum vóru 17 tóv tilsamans fyri at greina sundur ekkóskriftina undir kanningunum, og 331 nytrur av sild, 204 nytrur av svartkjafti og 4 nytrur av makreli til aldursgreining vórðu tiknar av veiðuni. Sum liður í kanningunum av føðini hjá sild, svartkjafti og makreli eru 116 magar av sild, 30 magar av svartkjafti og 4 magar av makreli tiknir til kanningar úr somu hálum, sum nytrur vórðu tiknar.

Í alt 25 WP2 (planktonglúpur niður á 200m) og 28 CTD-støðir (hita- og saltmátingar) vórðu tiknar á túrinum, ella fyri umleið 50. hvønn fjórðing, ið siglt varð.

**Nær verða sýnini liðugt viðgjørd:** Sýnini verða arbeidd í landi, og aldursgreinað tilfar skal vera til skjals skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 25. mai. Hetta fyri at tølini kunnu nýtast til stovnsmetingar av norðhavssild og svartkjafti í felags túrfrágreiðingini, sum skal vera liðug tann 30. juni.

**Niðurstøður**
Sild: Áleið sama nøgd av sild var at síggja norðan fyri Føroyar í ár sum undanfarnu árini.
Svartkjaftur: Heldur meira av svartkjafti var at síggja í ár. Árgangurin frá 2009 sást í veiðuni.
Makrelur: Eingin makrelur norðanfyri enn. Í fjør var makrelurin komin norður á 64º30 hesa tíðina.
Æti: Nøgdirnar av æti vóru áleið tær somu sum í fjør.

Leon Smith
Magnus Heinason
15. mai 2011



**Mynd 1**. Siglingarleiðin hjá *Magnusi Heinasyni* á silda- og svartkjaftatúrinum í mai 2012. Tilsamans 28 CTD-støðir (Gult) og 17 trolstøðir (grønt). Sigldir vóru umleið 1790 fjórðingar.




**Mynd 2**.  Ætlaðar siglingarleiðir hjá *Magnusi Heinasyni*, *Johan Hjort*, *Dana* og *Árna Friðrikssyni* í mai 2012.




**Mynd 3a.** Ekkóvirðir av norðhavssild ($s_A$ mm/nm$^2$) á kanningunum norðanfyri 3-15/5 2012. Sirklar vísa, hvussu nógv sild stóð undir skipinum.




**Mynd 3b.** Ekkóvirðir av norðhavssild hagtalspunt (0,5 x 1 gradir) á kanningunum norðanfyri á túri 1218, 3-15/5 2012. Samanlagt umleið 1.2 milliónir tons.




**Mynd 4.** Longdarbýti av norðhavssild á túri 1218, 3. -15. mai 2012. Miðallongd 33,7 cm, miðalvekt 275 g.




**Mynd 5.** Ekkóvirðir av svartkjafti ($s_A$ mm/nm$^2$) á kanningunum norðanfyri 3-15/5 2012.




**Mynd 6.** Longdarbýti av svartkjafti á túri 1218, 3-15/5 2012. Miðallongd 30.7 cm og miðalvekt 179 g. (30,1 cm og 149 g í 2011)




**Mynd 7.** Ekkóvirðir av makreli ($s_A$ mm/nm$^2$) á kanningunum norðanfyri 3-/15-5 2012.




**Mynd 8.** Hitin  í vatnskorpuni og miðallongd og vekt av sild á trolstøðum á túri 1218, 3-15/5 2012.